DAGSINS MEINING

Takið væl ímóti mentanaráliti

Í vikuni lat Mentamálastýrið við landsstýrismanni tess, Óla Holm á odda, tinginum eitt væl úr hondum greitt álit undir heitinum "Mentan og Menning". Tað snýr seg um eina mentanarpolitiska ætlan fyri tíðarskeiðið 2002-2006. Hetta álit kemur í kjalarvørrinum á ødrum frágreiðingum, sum eru gjørdar um mentanarviðurskifti og –politikk. At nógv orka er løgd í hetta arbeiðið, og at tað eisini byggir á undanfarnar frágreiðingar og loksins setir ljóskastaran á alt málið á ein meira ítøkiligan hátt enn nakrantíð áður, kunnu vit bert fegnast.

Nú er ætlanin, at aðalorðaskifti skal vera á tingi um frágreiðingina. Vónandi fara tingmenn og flokkar ikki at halda fast um gamlar fordómar og vanahugsan um mentan og list, soleiðis sum vit tíanverri alt ov oftani eru vitni til. Um at hetta er ikki nakað, sum samfelagið skal brúka pengar uppá. Tað er sjálvandi spell, at henda frágreiðing og ætlan verður løgd fram beint uppundir eitt val. Hinvegin eigur tað ikki at minka um virðið og innihaldið og enn minni intentiónina við henni, nevniliga at stuðla og gagna teimum fólkum her á landi, sum vilja brúka síni evni og sítt lív til mentan og list.

Tosað verður um at seta av 24 mill. kr. komandi 5 árini til umrøddu ætlan. Hesum eiga allir tingmenn á Føroya løgtingi at kunna taka undir við. Hetta er at meta sum ein týðandi iløga eins væl og tær iløgur, sum í hesum døgum verða gjørdar í tunlar, skip og vegir. Øll hesi tingini hava týdning fyri okkum øll, og tí má tað ikki henda, at ein meiriluti av flokkunum antin boykottar ella forðar fyri slíkari menniskjansligari og samfelagsligari iløgu sum átøk á mentanarøkinum í veruleikanum er. Hetta er eitt alt ov týdningarmikið mál til at verða kveistrað av borðinum sum valagn fyri ein ávísan flokk. Eingin flokkur og eingin politikari eigur mentanina og listina. Hana eiga vit øll. Hana fáa vit øll gleði og íblástur av. Tí er hetta ikki ein flokspolitisk avgerð um at taka undir við hesi ætlan ella ikki. Tað er gott, at politikarar og embætisfólk hava lagt nógva orku í hetta mál. Við hesum hava teir rudda slóð, soleiðis at øll onnur kunnu vera við til at fremja slíka iløgu í felag. Soleiðis at øll kunnu siga seg eiga æruna av henni. Hetta er politikkur, tá hann er bestur.

Tí skal tað vera vón okkara, at allir flokkar á tingi væl og virðiliga kunna seg við frágreiðingina og við opnum sinni viðgera hana á tingi.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Svar til Suna Jacobsen

Svar upp á fyrispurning frá Suna Jacobsen í Dimmalætting, 5. mars 2002 og í Sosialinum, 6. mars 2002.

Andras Róin
Føroya Tele

Sum eg skilji fyrispurning tygara, spyrja tygum um, hvussu tað ber til, at Føroya Tele ikki hevur veitingarskyldu til alt landið, tá tað snýr seg um møguligt framtíðar sjónvarpsvirksemið hjá Føroya Tele, og tá tað snýr seg um fast internetsamband.

Sjónvarpsvirksemi
Tað er rætt, at § 1, b) í fjarskiftislógini sigur, at "Endamál lógarinnar er at fremja at javngóð fjarskiftistænasta verður veitt um alt landið til somu treytir." Í § 8 í somu lóg, er tað heimilað landssýrismanninum at veita konssesión undir ávísum treytum. Í 1999 fekk Føroya Tele eina konsession til sítt fjarskiftisvirksemið frá landsstýrismanninum í vinnumálum. Fylgiskjal 3 til konsessiónina hjá Føroya Tele ásetir, hvat veitingarskyldan hjá Føroya Tele umfatar. Í § 2 í fylgiskjali 3 sæst, at veitingarskyldan í høvuðsheitum bert fevnir um telefoninet og tilhoyrandi telefonitænastur og ISDN og tilhoyrandi ISDN-tænastur. Tá sjónvarpsvirksemið ikki hoyrir undir hesar bólkar, er niðurstøðan, at Føroya Tele ikki hevur veitingarskyldu til sjónvarpsvirksemið.

Á teimum økjum har Føroya Tele hevur veitingarskyldu, arbeiðir Føroya Tele hvønn dag við áhaldandi at liva upp til veitingarskylduna, t.d. við at syrgja fyri at útjaðarin, innan fyri karmarnar av veitingarskylduni, fær somu fjarskiftistænastu, sum meginøkið fær.

Sum partafelag skal Føroya Tele rekast eftir handilsligum fortreytum. Hetta merkir, at har eingin veitingarskylda er, eru tað handilsligar metingar, sum eru avgerandi fyri í hvønn mun og hvar Føroya Tele velur at fara undir annað virksemið - herundir sjónvarpsvirksemið.

Eitt gott dømi um hvussu hetta virkar, er útbyggingin, sum Føroya Tele hevur framt av GSM fartelefontænastuni og útbreiðsluøkið fyri hesa tænastu. So hvørt sum felagið hevur mett tað verða handilsligt grundarlag fyri at víðkað um útbreiðsluøkið, er hetta gjørt. Nú dekka 61 basisstøðir yvir 99 % av teimum bygdu økjunum, og hetta hóast eingin veitingarskylda er á GSM tænastuni.

Hvørt Føroya Tele, um so er, at okkara verkætlan um eina víðkaða Rás Tórshavn gerst veruleiki, eisini fer út um meginøkini, má grundast á handilsligar metingar. Millum annað eisini av tí, at Føroya Tele sambært áðurnevndu konsession, ikki kann flyta pening frá virkisøkjum við yvirskoti til virkisøkir við undirskoti. Nevnast kann tó í hesum viðfangi, at Sjónvarp Føroya og Føroya Tele arbeiða saman um at gera eina forkanning til tess at lýsa møguleikarnar fyri og kostnaðin av, at ein víðkað Rás Tórshavn loysn kann dekka størri ella allar partar av landinum.

Fast internetsamband
Føroya Tele hevur ikki veitingarskyldu til fast internetsamband. Hóast hetta, hevur Føroya Tele í fleiri ár kunnað veitt kundunum fast internetsamband allastaðni í landinum til somu treytir.

Tórshavn, 6. mars 2002

Tað, sum er neyðugt, og so alt tað, sum er gott at hava

Thomas Arabo

Raðfesting verður eitt aðalmál hjá komandi løgtingi. Tað má tað vera, nú man hevur skarvað meira enn hálvtfjórðhundrað millióner av blokkinum, samstundis sum pengarnir fossa úr landskassanum við einari eykajáttan fyri og aðrari eftir, hóast ikki meira enn tveir mánaðir eru farnir av árinum.

Uppundir val er ongantíð mangul uppá hugskot av øllum møguligum slag. Alt gott um nýggj hugskot, har vit skulu seta á stovn nýggj sløg av skúlum til eitt og annað, men raðfestingin má vera rætt, tí at tíðirnar verða ikki altíð so góðar sum nú.

Vit mugu fáa fólkaskúlan at fungera optimalt. Er grundstamman ikki í lagi, so nyttar ikki hvussu fagrar og fjøltáttaðar greinar træið hevur. Kjakið má síggjast í eini heild, tí at samlaða upphæddin til taks er avmarkað, og tí má ein raðfesting gerast. Alt tað sum er neyðugt kemur fyrst, og niðast kemur so alt tað, sum er gott at hava. Um útbúgvingarverkið fer at stovnseta nýggjar skúlar av ymsum slag og fer at fevna ov vítt, so frykti eg fyri, at endin verður, at allir skúlar fara at ganga svangir. Fólkaskúlin er alneyðugur, meðan eitt nú ein ítrottarháskúli, sum okkurt løgtingsvalevni hevur nevnt, kann vera góður at hava. Í mínari verð er eingin ivi um, hvør skal raðfestast fyrst.

Fólkaskúlin og miðnámsútbúgvingar fyrst og so kunnu vit síggja, hvussu nógv verður eftir til ítróttarháskúlar, listaskúlar og annað.

Rætting

Í lesarabrævinum hjá Bødvardi Poulsen í blaðnum í gjár er eitt orð komið skeivt fyri: Hann skrivar um eitt bræv um »Hestleiðina«, sum ein skúvingur skrivar. Tað skal vera, sum ein skálavíkingur skrivar. Vit biða umbera mistakið.

blaðstj.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Fólkaskúlin og frískúlin

Viðmerking til Anitu á Fríðriksmørk, Eyðólv Dímon og uppskotið hjá Javnaðarflokkinum: "Bert 18 næmingar í yngstu flokkunum:"

Dorthe Gyldenkærne
lærari, Velbastað

..."Nøkur síggja hetta sum øktar møguleikar, onnur sum eina stóra hóttan". Soleiðis uppfati eg kjakið um at loyva frískúlar ella ikki loyva frískúlar í Føroyum.

15. februar viðgjørdi Anita á Fríðriksmørk í Dimmalætting tímatillutanina til møguligar komandi frískúlar. Hon stúrdi fyri, at frískúlar fara at fáa betri sømdir viðvíkjandi tímatillutan. Soleiðis at "næmingatalið í sær sjálvum verður eggjandi og tiltrekkjandi fyri bæði næmingar, foreldur og lærarar." Einum frískúla verða tillutaðir tímar/lærararlønir eftir sama frymli sum fólkaskúlin. Tvs. at næmingatalið ávirkar talið av tillutaðum tímum. Einasti munurin er, at ein komandi frískúli bert fær ein part av hesum útgoldið, í Danmark er tað 85%, men tað kann vera einhvør annar partur, alt eftir,hvat semja fæst um. - Hvussu tímarnar verða nýttir er so upp til tann einstaka frískúli at avgera.

Tímatillutanin er eina søga fyri seg. Hvør minnist ikki, tá tímatillutanin og "tíð" vóru á skránni í samband við lærararverkfallið í 2000. Ella neyðarropið hjá Vestmanna skúla um fleiri næmingartímar fyri at uppfylla lógarkarmarnar.

Soleiðis sum tímabýtið í almennu skúlaskipanini er uppbygt, er somikið stórur munur á skúlunum, at tað virkar heilt øvugt at stúra fyri, at framtíðar frískúlar skulu fáa einhvørjar fyrimunir fram um fólkaskúlarnar.

Latið okkum taka Suðurstreym sum dømi, har eru 8 fólkaskúlar av trimum/fýra sløgum innan ein radius uppá góðar 15 km.

1. Velbastað og Kaldbak - bygdaskúlar (grundskúlar sum ikki er *ársbýttir)
2. Hoyvíkar Skúli og Sankta Frans Skúli - býskúlar við ongari framhaldsdeild (grundskúlar sum eru *ársbýttir)
3. Eysturskúlin, Kommunuskúlin og Venjingarskúlin - framhaldsdeildarskúlar sum eru *ársbýttir
4. Argja Skúli – framhaldsdeildarskúli sum er *ársbýttur, men hevur umleið sama næmingartal sum Vestmanna Skúli – og sum tí væntandi hevur somu trupulleikar sum Vestmanna skúli.

*ársbýttur skúli merkir: Skúli, har næmingarnir eru flokkaðir eftir aldri, í mótsetning til ikki ársbýttir t.d. bygdaskúlar sum sum oftast hava fleiri flokkar inni í stovuni í senn.

Børnini í Kaldbak og á Velbastað fáa færri undirvísingartímar enn børnini í Havn, á Argjum og í Hoyvík. Størri skúlarnar kunnu geva børnini teir tímanir, ið skúlalógin ásettir, tað kunnu bygdaskúlarnar ikki. Hóast børn á bygd hvørki lesa, skriva ella hugsa skjótari enn børn í Havn. At læra er ein tilgongd sum tekur tið.

Her afturat hava Eysturskúlin, Kommunuskúlin og Venjingarskúlin fleiri tímar at ráða yvir enn Hoyvíkar Skúli og Sankta Frans Skúli, sum eru grundskúlar.

Tað hevur við sær at stóru framhaldsdeildsskúlarnir t.d. kunnu raðfesta byrjanarundirvísing høgt og bjóða tveir lærarar til ein flokk við 24 ársbýttum næmingum stóran part av tímunum.

Altso reelt eitt flokksnæmingartal sum er 12 ... "soleiðis at næmingartalið í sær sjálvum vera eggjandi og tiltrekkjandi fyri bæði næmingar, foreldur og lærarar", sum Anita á Fríðriksmørk tekur til.

Til samanbering kann sigast, at ein bygdaskúli kann hava t.d.16 næmingar – ella fleiri - úr t.d. trímum ymiskum aldursbólkum, umframt ikki at kunnu bjóða teir tímarnar, sum lógin ásettir.

Hví skulu børn og foreldur í Hoyvík t.d. ikki hava somu sømdir sum børn og foreldur í Venjingarskúlanum? Fyri ikki at taka bygdabørnini uppá tal!

Eyðólv í Dímon skrivar 27.februar í Sosialurin, ... „at játtanin til fólkaskúlan verður lækkað við somu upphædd, sum frískúlin/frískúlarnir skulu hava."

Um so, at játtað vóru 85% av t.d. 10 lærarastørvum til ein ella fleiri frískúlar, hvat so? Verða so 10 lærarar loystir úr størvum sínum í fólkaskúlanum vegna færri næmingar? Neyvan.

Mest realistiskt er, at nakrir næmingar úr fleiri skúlaøkjum og úr fleiri flokkum byrja í ein frískúla. Tað førir við seg, at flokksnæmingatalið í fólkaskúlanum lækkar, og tað hava greinskrivarnar – sum bæði eru lærararlærdir – helst onki ímóti!

Javnaðarflokkurin hevur uppskot frammi um, at lækka næmingatalið í teimum yngrum flokkum (Sos. 2. mars) til 18 næmingar. Í Havn, Argir og Hoyvík kann roknast við at ítøkilig avleiðingar av uppskotinum í fyrstu atløgu eru umleið 8 flokkshølir afturat til umleið 144 næmingar, t.e. umleið 6 fulltíðar lærararstørv; umframt greitt skal vera, hvat skal henda í 3.flokki. Hvørjir flokkar skulu splittast upp aftur, ella hvørjir skúlar skulu verða trý-sporaðir?

Um ein hugsar eitt sindur kreativt, so kunnu næmingartalið í lógaruppskotið hjá Javnaðarflokkinum svara til ein frískúla við umleið 144 næmingar í Havnini.- Og hetta er bert fyrsta árið, árið eftir koma so umleið 72 næmingar afturat, sum ikki mugu vera í eini stovu við eitt næmingatali, sum fer upp um 18.

(Talið av næmingunum 144 havi eg fingið við at siga 24 næm. – 18 næm. = 6 næm. Faldað við talinum av 1. og 2. flokkum á teimum seks stóru skúlunum í Havn. Tvs. 6 næm. x 12 flokkar x 2 spor = 144 næm.)

Aftur til greininum hjá Eyðólv í Dímon. Greinin ber heitið "Óneyðugt við lóg um frískúlar" og hansara grundgeving fyri hesum er, at lógarkarmarnir í tí nýggju fólkaskúlalógini eru so víðir."

Eftir at havi lisið greinina, sum eftir mínum tykki ikki vísir "andsfrælsi, tollyndi, javnviði og fólkaræði", er tað í mínum eygum enn meiri umráðandi at fáa ein lóg um frískúlar.

Eftir mínum tykki vil ein lógarsamling, sum m.a. inniheldur ein frískúlalóg, vísa at Føroyar er ein tjóð, sum í praksis er sinnað at liva upp til "andsfrælsi, tollyndi, javnviði og fólkaræði." – og ikki bara eitt eiti – og á hendan hátt liva upp til ST-samtýkkina...

...Øvugt, um vit ikki fáa eina frískúlalóg. So fær fólkaskúlin stórar trupulleikar við trúvirðinum av endamálsorðingini um "andsfrælsi, tollyndi, javnviði og fólkaræði.", tá ið sjálvt hægsti mynduleikin ikki kann liva upp til hetta.

Altjóða kvinnudagur og vunnin rættindi

Annita á Fríðriksmørk

Eg læs einaferð um eina fyrimyndarliga kvinnu:
- hon hevði eina hægri útbúgving, gott leiðarastarv, og sá gott út
- hon var fyrikomandi, blíð og dugnalig sum leiðari
- hon og maðurin høvdu fleiri felags áhugamál, og vóru í javnan saman við børnunum til ymisk tiltøk í býnum
- hon hevði fleiri gullmedaljur frá síni 20 ára karrieru í hondbólti og fótbólti
- tey áttu trý børn, sum øll kláraðu seg væl í skúlanum og í ítróttinum
- heima legði hon stóran dent á heimahugna og megnaði altíð at hava heimið ruddiligt og reint,
- altíð syrgdi hon fyri onkrum heimabakaðum og gjørdi nógv burturúr at seyma og at binda klæðir til børnini,
- familja og vinir vóru ofta á vitjan
- og so var hon viðurkend sum ummælarin til skaldsøgur og fakbøkur

Hendan kvinnan var um tað mundi 35 ára gomul, og man verða dreymurin hjá mangari.

Men, so endaði søgan um hesa kvinnu, sum kláraði alt, at hon hvørki var, er ella verður nøkur sum helst, - tí slík kvinna finst ikki!

Vunnin rættindi
Men hvør er so tann kvinnan, sum vit í strembanini eftir javnstøðu og líkarætti og á altjóða kvinnudegi ár eftir ár leita eftir.

Strembanin er sjálvsagt til eina og hvørja tíð merkt av tí samtíð, tú livir í, og hevur røtur langt aftur í tíðina. Nógvir varðar eru lagdir á vegnum, og hvør varði hevur kravt nógva orku:
- einaferð varð stríðst fyri, at eisini gentur skuldu ganga í fólkaskúla
- seinni var stríðst fyri valrætti til kvinnur
- uppaftur seinni var stríðst fyri, at kvinnur og menn skuldu hava somu løn fyri sama arbeiðið

Hesi viðurskifti kundu øsa fólk um tað mundið stríðið stóð. Men í dag eru hasi viðurskifti so sjálvsøgd, at ongin hugsar um, at tey í veruleikanum eru vunnin rættindi, sum nógv tíð og orku liggur aftanfyri.

Tey bleytu virðini verða einaferð vunnin rættindi
Anno 2002 er framvegis langt á mál. Men í dag eru onnur viðurskifti, sum orka skal leggjast í. Nú eru tað tey bleytu virðini sum framhaldandi skulu á dagsskránna.

Í høvuðsheitum er tað ein spurningur um, hvussu familjupolitikkur kann sameinast við arbeiðsmarknaðarkrøv har kvinnur og menn verða javnstillað. Soleiðis:
- at familjan fær meiri tíð saman
- at barnsburðarfarloyvi verður longt til eitt ár
- at barnaansingartrygd verður veitt frá tí barnið er eitt ár
- at eldrarøkt verður ein sjálvsagt krav hjá øllum gomlum, sum ynskja tað
- at sálarliga veik fáa betri liviumstøður osfr osfr

Tað er støðan innan tey bleytu økini, sum í stóran mun eru avgerandi fyri, hvønn leiklut kvinnan finnur sær her í samfelagnum. Jú lægri tey bleytu virðini verða raðfest, jú verri er valmøguleikin hjá kvinnuni; og jú hægri tey bleytu virðini eru raðfest, jú betri er valmøguleikin hjá kvinnuni.

Ti eigur ein altjóða kvinnudagur í dag at taka hond í tey bleytu virðini og virka fyri at tey verða støðugt ment.

So eru útlit fyri, at eisini tey einaferð verða sjálvsøgd vunnin rættindi.

At enda vil eg ynskja øllum ein góðan altjóða kvinnudag.

Prátið um íbúðarbygging – Kann loysast við tveimum lógarbroytingum!

Jákup Fróði Djurhuus
Vælevni sambandsfoksins í Suðurstreymi0

Havi lagt til merkis, at tey sum í dag sita við valdið, og sum nú uppundir løgtingsvalið byrja at tosa um íbúðarbygging, eru komin so væl upp í árini, at húsini eru um at rapa omanyvir tey.

Tí gongur so seint á hesum økinum.

Men trupulleikin er lættur at loysa. Verður td. Húsalánsgrunnurin javnsettur við ein privatpersón, sum byggir eini sethús – tvs, at stovnurin fær mvg aftur, og fær útgoldnan rentustuðulin, so eru bankarnir og tryggingarfeløg tilreiðar at fíggja hesa bygging beinaveg.

Tí tá loysir tað seg bæði væl og virðiliga. Bankarnir og tryggingin eru sprenfull av peningi at brúka til eitt slíkt endamál. Tað hava teir boða frá.